# Sjúkrahússtjóri
## Landssjúkrahúsið



Starvið sum sjúkrahússtjóri fyri Landssjúkrahúsið, Tórshavn verður við hesum lýst leyst til setan 1. september 2006 ella eftir nærri avtalu.

Landssjúkrahúsið verður fyrisitið av einari sjúkrahúsleiðslu, sum er mannað við sjúkrahússtjóra, sjúkrarøktarstjóra og læknastjóra, har sjúkrahússtjórin mótvegis Almanna- og heilsumálaráðnum hevur endaligu ábyrgdina. Nærri upplýsingar um Landssjúkrahúsið sí www.lsh.fo.

**Uppgávurnar verða í høvuðsheitum at hava:**
- ábyrgd fyri ráðlegging, raðfesting, ígongdseting og samskipan av arbeiðsuppgávunum á sjúkrahúsinum
- ábyrgd fyri støðugari menning á sjúkrahúsinum, soleiðis at sjúkrahúsið støðugt tillagar seg tørvinum hjá sjúklingunum og broytingunum í treytunum hjá sjúkrahúsinum
- ábyrgd fyri gerð av uppskoti til fíggjarætlan
- ábyrgd av at góðkend fíggjarætlan verður hildin
- ábyrgd fyri at hagtøl yvir virksemi á sjúkrahúsinum verða fingin til vega
- ábyrgd fyri at sett verða mál fyri sjúkrahúsið innan kanningar-, viðgerðar-, og røktarøkini, umframt fíggjar- og starvsfólkaligu økini í trá við tey mál og stevnumið, sum verða ásett í Almanna- og heilsumálaráðnum
- samstarv við onnur sjúkrahús, primeru heilsutænastuna, útbúgvingarstovnar og aðrar almennar stovnar við tilknýti til almanna-og heilsuøkið.

**Ynskiligt er við umsøkjara sum lúkar niðanfyrinevndu krøv:**
- Útbúgving frá hægri lærustovni innan búskap, samfelagsfrøði ella líknandi.
- áhuga og kunnleika til heilsuverkið og heilsubúskap
- leiðsluroyndir helst frá almenna arbeiðsmarknaðinum.
- góð leiðslu- og samstarvsevni.
- mennandi leiðslustíl
- vitan um tær treytir sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting
- evni at seta í verk fyriskipanir
- kunnleika til fíggjarstýring

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanarøkið er Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, við tænastu á Landssjúkrahúsinum.
Næsti fyrisetti er aðalstjórin í Almanna- og heilsumálaráðnum.
Starvið er áramálssett í 5 ár við serligum sáttmála.
Lønin er ájavnt við 38. lønarflokk hjá tænastumonnum við 15 % í eftirlønargjaldi og eini áramálsviðbót.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til:
Poul Geert Hansen, aðalstjóra, teldupostadr. pgh@ahr.fo tlf. 304500, ella Mariu á Dul, starvsfólkastjóra, teldupostadr.: mad@ahr.fo , tlf. 30 40 50.

**Umsókn:**
Umsókn við C.V. og avriti av neyðugum skjølum skal sendast til:

Almanna- og heilsumálaráðið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist**: 25. august 2006 kl. 12.00

www.ahr.fo








ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ